# Tórshavnar kommuna

Ársroknskapur 2008

# INNIHALDSYVIRLIT

| | Síða |
|---|---|
| Høvuðstøl | 2 |
| Undirskrift leiðslunnar | 3 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 4 |
| Nýttar roknskaparreglur | 5 |
| Eventualskyldur o.a. | 7 |
| Rakstrarroknskapur og gjaldføri fyri 2008 | 8 |
| Fíggjarstøða 31. desember 2008 | 10 |
| Notur til rakstrarroknskapin | 11 |
| Notur til gjaldføri | 15 |
| Notur til fíggjarstøðuna | 16 |

# HØVUÐSTØL

Í talvuni niðanfyri eru víst høvuðstøl úr ársroknskapinum 2008 mótvegis endaligu fíggjarætlanini.

| tkr. | Rokn-skapur 2008 | Ætlan 2008 | Frávik |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | |
| Skattainntøkur, netto | 619.335 | 583.000 | 36.335 |
| Aðrar inntøkur | 2.606 | 2.956 | -350 |
| | **621.941** | **585.956** | **35.985** |
| **Útreiðslur** | | | |
| Fyrisitingarútreiðslur | 54.274 | 55.218 | -944 |
| Tekniskar veitingar | 114.119 | 119.345 | -5.226 |
| Skúlamál | 45.788 | 46.079 | -291 |
| Mentamál | 31.852 | 36.771 | -4.919 |
| Barnaansing | 132.154 | 137.144 | -4.990 |
| Sosial- og heilsumál | 37.621 | 35.533 | 2.088 |
| Aðrar útreiðslur | 53.546 | 58.293 | -4.747 |
| Ov lítið avroknaður skattur undanfarin ár | 8.881 | 0 | 8.881 |
| Serligar upphæddir, netto | -2.184 | 0 | -2.184 |
| | **476.051** | **488.383** | **-12.332** |
| Íløgur og nýútveganir | 254.497 | 360.166 | -105.669 |
| **Úrslit áðrenn rentur og avdráttir** | **-108.608** | **-262.593** | **153.986** |
| Rentur, netto | 2.738 | 3.000 | -262 |
| Avdráttir | -2.730 | 0 | -2.730 |
| **Avlop** | **-108.600** | **-259.593** | **150.994** |

| | | |
|---|---|---|
| **Gjaldføri** | | |
| Gjaldføri við ársbyrjan | 151.193 | - |
| Broytingar í gjaldførinum | -98.356 | - |
| **Gjaldføri við árslok** | **52.837** | - |

Gjaldførið við árslok fevnir um innistandandi í peningastovnum.

# UNDIRSKRIFT LEIÐSLUNNAR

Býráðið hevur í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin fyri 2008 hjá Tórshavnar kommunu.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin vísir ársins inntøkur og útreiðslur eins og ognir og skyldur hin 31. desember 2008.

Tórshavn hin 20. mai 2009

Í býráðnum:

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen<br>*formaður* | Bogi Andreassen<br>*1. varaborgarstjóri* | Sjúrður Olsen<br>*2. varaborgarstjóri* |
| Jógvan Arge | Elin Lindenskov | Annfinn Brekkstein |
| Vagnur Johannesen | Levi Mørk | Maria Hammer Olsen |
| Halla Samuelsen | Jan Christiansen | Jákup Símun Simonsen |
| Marin Katrina Frýdal | | |

# ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Átekning á ársroknskapin**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Tórshavnar kommunu fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2008.

**Ábyrgdin hjá kommunustýrinum av ársroknskapinum**
Kommunustýrið hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttu roknskaparreglunum. Henda ábyrgd ber í sær, at kommunan støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at kommunan kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd, hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av kommununnar ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2008 og av úrslitinum av virksemi og gjaldføri kommununnar í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2008 samsvarandi nýttu roknskaparreglunum.

**Ískoytis upplýsingar**
Undir umrøðuni av nýttum roknskaparreglum verður upplýst, at roknskapurin ikki er uppsettur eftir teimum reglum, sum Føroya Landsstýri hevur sett í serligari leiðbeining. Okkum er upplýst, at kommunan sendir serliga uppgerð, sum lýkur ásettu reglurnar, til Føroya Landsstýri. Av nýttum roknskaparreglum framgongur eisini, at maskinur og amboð umframt íløgur í vegir, kloakk, vatn o.a. verða avskrivað, meðan onnur materiell støðisogn ikki verður avskrivað.

Tórshavn hin 20. mai 2009

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

| | |
|---|---|
| Mirjam Haraldsen<br>*statsaut. revisor* | Hjalmar Klein Olsen<br>*grannskoðari* |

# NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR

Ársroknskapurin fyri 2008 er gjørdur eftir niðanfyristandandi roknskaparreglum, sum eru óbroyttar í mun til undanfarna ár, tó undantikið at ikki nýttar upphæddir ikki eru fluttar fram eins og gjørt hevur verið undanfarin ár. Samanberingartølini eru rættað samsvarandi.

Broytingin í nýttum roknskparreglum merkir, at "úrslit at flyta til eginpening" fyri 2007 økist við 13.799 tkr., kapitalkontan við ársbyrjan 2007 økist við 82.894 tkr. og við 96.693 tkr. við árslok 2007.

Ársroknskapurin er uppsettur eftir sama sniði sum undanfarna ár og ikki eftir serligu leiðbeiningini frá Føroya Landsstýri um roknskaparuppstilling av kommunuroknskapum.

**Tórshavnar Havn**
Tórshavnar Havn hevur egið bókhald og setir upp egnan ársroknskap. Tølini fyri Tórshavnar Havn eru tikin við í ársroknskapin hjá Tórshavnar kommunu á tann hátt, at nettoúrslitið er tikið við í rakstrarroknskapin, og ogn, skuld og eginpeningur eru innroknað í fíggjarstøðuna.

**Inntøkur**
Húsaleiga og aðrar inntøkur verða inntøkuførdar, tá ið rokning verður send.

Skattainntøkurnar verða tíðargreinaðar til roknskaparárið.

Broytingar í skattaálíkningum fyri undanfarin ár verða rakstrarførdar undir roknskaparupphæddini "Serligar upphæddir".

**Kostnaður**
Kostnaður verður tikin við so hvørt, sum rokningarnar koma til kommununa.

**Rentur**
Bæði rentuinntøkur og rentuútreiðslur eru tíðargreinaðar til 31. desember 2008.

**Avskrivingar**
Maskinur og amboð verða avskrivað við 25% av saldu. Íløgur í vegir, kloakk, vatn o.a. verða avskrivaðar í sama ári, sum íløgan verður framd. Onnur materiell støðisogn verður ikki avskrivað.

# NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR

**Serligar upphæddir**

Serligar upphæddir eru sundurgreinaðar í notu 9. Upphæddirnar fevna um skattabroytingar viðvíkjandi undanfarnum árum og aðrar serligar upphæddir í árinum.

**Fíggjarlig støðisogn**

Fíggjarlig støðisogn veður virðissett til útveganarvirði.

**Materiell støðisogn**

Materiella støðisognin er virðissett við støði í útveganarvirðinum. Íløga í vegir, kloakk, vatn o.a., verður avskrivað í sama ári íløgan er framd. Maskinur og amboð verða avskrivað við 25% av saldu. Onnur materiell støðisogn verður ikki avskrivað.

**Virðisbrøv**

Skrásett virðisbrøv verða virðissett til kursvirði við roknskaparárslok.

**Skattaeftirstøður**

Skattaáogn er upptikin út frá upplýsingum frá TAKS. Avsett er í móti væntaðum tapi.

**Gjaldførisyvirlit**

Gjaldførisyvirlitið fyri kommununa er gjørt við støði í broytingunum ímillum primo- og ultimo-postarnar í fíggjarstøðuni. Tøkur peningur hjá Tórshavnar Havn er lagdur afturat gjaldførinum hjá kommununi við árslok, soleiðis at samlaða gjaldførið framkemur.

# EVENTUALSKYLDUR O.A.

**Ravmagnsfelagið SEV**
Fyri Ravmagnsfelagið SEV borgar kommunan saman við hinum limakommunum ein fyri allar, allar fyri eina og sínámillum í mun til íbúgvaratalið fyri tær árligu útreiðslurnar til rentur og avdráttir av virkislánum felagsins og aðrar útreiðslur, íroknað møguligt rakstrarhall.

**Játtanir yvir fleiri ár**
Kommunan hevur bundið seg til einar 34.865 tkr. til ymsar studningar v.m. yvir næstu 3-5 árini.

**Aðrar skyldur**
Aðrar skyldur, sum hvíla á kommununi, eru við árslok 2008 gjørdar upp til 20.473 tkr. Talan er í høvuðsheitum um upphæddir, har ósemja er í sambandi við størri byggiætlanir.

**Veðsetingar**
Í ognum kommununnar eru tinglýstir veðrættir fyri til samans 40.330 tkr.

# AÐRAR UPPLÝSINGAR

**Tórshavnar Havn**
Roknskapartølini fyri Tórshavnar Havn eru tikin við í ársroknskapinum hjá kommununi við einum tali í rakstrinum, gjaldførinum, ognunum, skuldini og eginognini. Kommunan eigur havnina og ábyrgdast sostatt fyri øllum skyldum hjá Tórshavnar Havn.

Víst verður eisini til ársroknskapin fyri Tórshavnar Havn.

# RAKSTRARROKNSKAPUR OG GJALDFØRI FYRI 2008

| Nota | tkr. | Rokn-skapur 2008 | Fíggjar-ætlan 2008 | Rokn-skapur 2007 |
|---|---|---|---|---|
| 1 | **Inntøkur** | **621.941** | **585.956** | **601.290** |
| | **Útreiðslur** | | | |
| 2 | Fyrisitingarútreiðslur | 54.274 | 55.218 | 47.918 |
| 3 | Tekniskar veitingar | 114.119 | 119.345 | 94.886 |
| 4 | Skúlamál | 45.788 | 46.079 | 40.075 |
| 5 | Mentamál | 31.852 | 36.771 | 28.199 |
| | Barnaansing | 132.154 | 137.144 | 122.398 |
| 6 | Sosial- og heilsumál | 37.621 | 35.533 | 37.471 |
| 7 | Aðrar útreiðslur | 53.546 | 58.293 | 47.698 |
| | | **-469.354** | **-488.383** | **-418.645** |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **152.587** | **97.573** | **182.645** |
| 8 | Rentuinntøkur, netto | 2.738 | 3.000 | 4.407 |
| | **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **155.325** | **100.573** | **187.052** |
| | Avskrivingar | -98.442 | 0 | -78.692 |
| | **Úrslit áðrenn serligar upphæddir** | **56.883** | **100.573** | **108.360** |
| 9 | Serligar upphæddir, netto | -6.698 | 0 | 3.359 |
| | **Úrslit at flyta til eginogn** | **50.185** | **100.573** | **111.719** |
| | Nettoúrslit, Tórshavnar Havn | 24.581 | | 19.496 |
| | **Samlað úrslit áðrenn avdráttir og íløgur** | **74.766** | **100.573** | **131.215** |

Tølini omanfyri fevna bert um Tórshavnar kommunu. Tølini fyri Tórshavnar Havn eru víst fyri seg niðast í yvirlitinum. Víst verður til ársroknskapin fyri Tórshavnar Havn.

# RAKSTRARROKNSKAPUR OG GJALDFØRI FYRI 2008

| Nota | tkr. | Rokn-skapur 2008 | Fíggjar-ætlan 2008 | Rokn-skapur 2007 |
|---|---|---|---|---|
| | **GJALDFØRI FYRI 2008** | | | |
| | **Úrslit hjá kommununi** | **50.185** | **100.573** | **111.719** |
| | Javningar uttan gjaldførisávirkan | 91.428 | - | 69.414 |
| | **Gjaldføri frá rakstri kommununnar** | **141.613** | **100.573** | **181.133** |
| 10 | Íløgur | -231.477 | -343.662 | -139.563 |
| | Nýútveganir | -23.020 | -16.504 | -22.236 |
| | Avdráttir av lánum | -2.730 | 0 | -3.716 |
| | Broyting í skuldarum, skattaeftirstøðum v.m. | -12.068 | - | -12.865 |
| | Broyting í ognarum v.m. | 29.326 | - | 3.134 |
| | **Broyting í gjaldføri gjøgnum árið** | **-98.356** | **-259.593** | **5.887** |
| | Gjaldføri, primo | 151.193 | - | 145.306 |
| | **Gjaldføri ultimo, kommunan** | **52.837** | **-** | **151.193** |
| | Gjaldføri ultimo, Tórshavnar Havn | 70.545 | **-** | 69.467 |
| | **Samlað gjaldføri, ultimo 2008** | **123.382** | **-** | **220.660** |

# FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2008

| Nota | tkr. | 31/12 2008 | 31/12 2007 |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| | Tøkur peningur | 52.838 | 84.198 |
| | Virðisbrøv | 0 | 66.995 |
| 11 | Aðrar ognir í umferð | 137.547 | 116.172 |
| 12 | Fíggjarlig støðisogn | 5.343 | 6.343 |
| 13, 14 | Materiell støðisogn | 1.295.364 | 1.143.386 |
| 15 | Skattaeftirstøður | 3.800 | 13.106 |
| 16 | Ogn, Tórshavnar Havn | 432.287 | 407.211 |
| | **OGN TIL SAMANS** | **1.927.179** | **1.837.411** |
| | **SKYLDUR** | | |
| | **Skuld** | | |
| | Forútgoldið | 3.483 | 0 |
| 17 | Stuttfreistað skuld | 64.437 | 50.616 |
| | Lán | 6.283 | 9.014 |
| 18 | Skuld, Tórshavnar Havn | 30.771 | 30.278 |
| | **Skuld til samans** | **104.974** | **89.908** |
| | **Avsetingar v.m.** | | |
| 19 | Trygdargrunnar v.m. | 1.602 | 1.668 |
| | **Avsetingar til samans** | **1.602** | **1.668** |
| | **Eginogn** | | |
| 20 | Eginogn, Tórshavnar kommuna | 1.419.088 | 1.368.903 |
| | Eginogn, Tórshavnar Havn | 401.515 | 376.932 |
| | **Eginogn til samans** | **1.820.603** | **1.745.835** |
| | **SKYLDUR** | **1.927.179** | **1.837.411** |

# NOTUR TIL RAKSTRARROKNSKAPIN

| | tkr. | Rokn-skapur 2008 | Fíggjar-ætlan 2008 | Rokn-skapur 2007 |
|---|---|---|---|---|
| 1 | **Inntøkur** | | | |
| | Inntøka av traðum og økjum | 2.606 | 2.956 | 13.266 |
| | Persónsskattur v.m. | 575.969 | 553.000 | 564.021 |
| | P/F-skattur | 77.927 | 30.000 | 50.669 |
| | Rentustuðul | -27.305 | 0 | -19.953 |
| | FAS-endurgjald | -7.256 | 0 | -6.713 |
| | | **621.941** | **585.956** | **601.290** |
| 2 | **Fyrisitingarútreiðslur** | | | |
| | Miðfyrisitingin | 23.394 | 23.394 | 19.341 |
| | Trivnaðarfyrisitingin | 8.615 | 8.637 | 8.044 |
| | Tekniska fyrisitingin | 16.182 | 17.103 | 14.060 |
| | Edv-deildin | 6.083 | 6.084 | 5.017 |
| | Kommunala skattakærunevndin | 0 | 0 | 1.456 |
| | | **54.274** | **55.218** | **47.918** |
| 3 | **Tekniskar veitingar** | | | |
| | Vegir, gøtur, reinhald o.a. | 20.886 | 19.296 | 14.143 |
| | Umhvørvismál | 1.737 | 2.425 | 1.189 |
| | Vatnveitingin og gøtuljós | 13.919 | 14.088 | 12.240 |
| | Renovatiónin | 16.929 | 21.719 | 18.707 |
| | Asfalt, ferðsla og grótbrot | 21.611 | 20.996 | 17.029 |
| | Bussleiðin | 17.481 | 17.207 | 12.594 |
| | Sløkkiliðið | 9.679 | 11.360 | 9.564 |
| | Fríðkan og kirkjugarðar | 11.877 | 12.254 | 9.420 |
| | | **114.119** | **119.345** | **94.886** |

# NOTUR TIL RAKSTRARROKNSKAPIN

| | tkr. | Rokn-skapur 2008 | Fíggjar-ætlan 2008 | Rokn-skapur 2007 |
|---|---|---|---|---|
| **4** | **Skúlamál** | | | |
| | Kollafjarðar skúli | 2.312 | 1.956 | 2.211 |
| | Ítróttarhøllin í Kollafirði | -18 | 500 | -221 |
| | Tórshavnar Kommunuskúli | 4.635 | 5.064 | 3.814 |
| | Venjingarskúlin | 3.658 | 3.064 | 3.876 |
| | Eysturskúlin | 4.034 | 4.111 | 3.779 |
| | Sankta Frans Skúli | 3.095 | 2.987 | 3.034 |
| | Skúlin í Hoyvík | 3.551 | 3.403 | 3.138 |
| | Skúlin við Løgmannabreyt | 1.204 | 1.370 | |
| | Hoyvíkshøllin | 296 | 475 | 132 |
| | Argja Skúli | 3.875 | 3.729 | 3.180 |
| | Kvøld- og Ungdómsskúlin | 2.440 | 5.010 | 4.125 |
| | Tórshavnar Musikkskúli | 7.879 | 6.922 | 5.506 |
| | Kaldbaks skúli | 480 | 524 | 374 |
| | Skúlin í Hesti | 89 | 112 | 38 |
| | Nólsoyar Skúli | 545 | 468 | 453 |
| | Velbastaðar Skúli | 762 | 609 | 644 |
| | Felags skúlamál | 6.951 | 5.775 | 5.992 |
| | | **45.788** | **46.079** | **40.075** |
| **5** | **Mentamál** | | | |
| | Tórshavnar Býarsavn | 262 | 1.160 | 336 |
| | Býarbókasavnið | 6.763 | 8.011 | 5.804 |
| | Svimjihylurin | 5.994 | 5.515 | 5.681 |
| | Stadion | 2.461 | 3.587 | 6.552 |
| | Studningur til yms. stovnar og endamál | 8.396 | 8.660 | 7.098 |
| | Íløgustuðul til feløg v.m. | 7.976 | 9.838 | 2.728 |
| | | **31.852** | **36.771** | **28.199** |

# NOTUR TIL RAKSTRARROKNSKAPIN

| | | Rokn-skapur 2008 | Fíggjar-ætlan 2008 | Rokn-skapur 2007 |
|---|---|---|---|---|
| | tkr. | | | |
| 6 | **Sosial- og heilsumál** | | | |
| | Sosial umsorgan og forsorg | 21.115 | 19.294 | 19.740 |
| | Lækna- og heilsumál | 4.433 | 4.405 | 5.921 |
| | Skúlatannlæknastovan | 9.769 | 9.453 | 10.063 |
| | Serflutningsskipanin | 443 | 380 | 512 |
| | Sambýlið í Hoydølum | 721 | 640 | 677 |
| | Sambýlið í Kollafirði | 802 | 655 | 656 |
| | Sambýlið í Mattalág | 113 | 500 | 0 |
| | Tilhaldið í Tórsgøtu | -22 | 0 | 3 |
| | Tilhaldið í Nólsoy | 247 | 206 | -101 |
| | | **37.621** | **35.533** | **37.471** |
| 7 | **Aðrar útreiðslur** | | | |
| | Ymiskar aðrar útreiðslur | 12.106 | 12.105 | 9.941 |
| | Sethús kommununnar | 0 | 0 | -303 |
| | Onnur hús kommununnar | 41.440 | 43.873 | 38.060 |
| | Reguleringskonta | 0 | 2.315 | 0 |
| | | **53.546** | **58.293** | **47.698** |
| 8 | **Rentur, netto** | | | |
| | Rentuinntøkur, peningastovnar | 2.146 | 4.000 | 3.044 |
| | Rentuinntøkur, aðrar | 254 | 0 | 507 |
| | Fíggjarinntøkur, virðisbrøv, netto | 1.336 | 0 | 2.403 |
| | Rentuútreiðslur, lán | -998 | -1.000 | -1.307 |
| | Rentuútreiðslur, kassakredittir | - | 0 | -240 |
| | | **2.738** | **3.000** | **4.407** |

# NOTUR TIL RAKSTRARROKNSKAPIN

| tkr. | | Rokn-skapur 2008 | Fíggjar-ætlan 2008 | Rokn-skapur 2007 |
|---|---|---|---|---|
| 9 | **Serligar upphæddir** | | | |
| | Broytingar í skatti viðv. eldri árum, netto | 8.881 | 0 | -5.412 |
| | Tap upp á skuldarar, netto | -395 | 0 | 855 |
| | Aðrar inntøkur og útreiðslur, netto | -1.788 | 0 | 1.198 |
| | | **6.698** | **0** | **-3.359** |

# NOTUR TIL GJALDFØRI

| tkr. | Rokn-skapur 2008 | Fíggjar-ætlan 2008 | Rokn-skapur 2007 |
|---|---|---|---|
| **10 Íløgur** | | | |
| Byggibúning, útstykkingar o.a. | 0 | - | 0 |
| Útlegg í sambandi við útstykkingar o.t. | 29.976 | - | 7.625 |
| Vegir o.t. | 68.583 | - | 41.614 |
| Vatnveiting | 2.983 | - | 2.753 |
| Renovatión | 5.305 | - | 5.343 |
| Skúlar | 80.145 | - | 48.910 |
| Ítróttur og frítíðarvirksemi | 26.186 | - | 21.376 |
| Fríðkan av býnum | 3.081 | - | 3.046 |
| Heilsumál | 202 | - | 121 |
| Eldrarøkt | 7.301 | - | 5.161 |
| Barnaansing | 226 | - | 1.824 |
| Bygningar | 7.309 | - | 1.487 |
| Annað | 180 | - | 303 |
| | **231.477** | **343.662** | **139.563** |

# NOTUR TIL FÍGGJARSTØÐUNA

| tkr. | | 31/12 2008 | 31/12 2007 |
|---|---|---|---|
| 11 | **Aðrar ognir í umferð** | | |
| | Skuldarar og onnur ogn í umferð | 23.442 | 28.246 |
| | Vørugoymslur | 954 | 1.052 |
| | Mvg | 21.669 | 19.148 |
| | Skattaavrokning fyri desember | 91.482 | 67.726 |
| | | **137.547** | **116.172** |
| 12 | **Fíggjarlig støðisogn** | | |
| | Innskot í SEV | 1.093 | 1.093 |
| | Partapeningur í Fjarhitafelagnum | 2.750 | 2.750 |
| | Virðisskjøl | 1.500 | 2.500 |
| | | **5.343** | **6.343** |
| 13 | **Grundøki, hús og útlegg** | | |
| | Hús kommununnar | 923.350 | 797.930 |
| | Økir, traðir o.a. | 63.347 | 63.347 |
| | Aðrar ognir | 26.801 | 28.025 |
| | Maskinur og amboð | 41.244 | 32.832 |
| | Útlegg í sambandi við útstykkingar o.t. | 67.006 | 47.636 |
| | | **1.121.748** | **969.770** |
| 14 | **Vegir, kloakkir, vatn o.a.** | | |
| | Íløga við ársbyrjan | 623.557 | 555.855 |
| | Tilgongd í árinum | 81.814 | 67.702 |
| | | **705.371** | **623.557** |
| | Áður avskrivað | -449.941 | -382.239 |
| | Avskrivað í árinum | -81.814 | -67.702 |
| | | **173.616** | **173.616** |

# NOTUR TIL FÍGGJARSTØÐUNA

| | tkr. | 31/12 2008 | 31/12 2007 |
|---|---|---|---|
| 15 | **Skattaeftirstøður** | | |
| | Persónsskattur | 14.042 | 13.106 |
| | Partafelagsskattur | 458 | 10.303 |
| | Avsett viðv. skattaeftirstøðum | -10.700 | -12.800 |
| | | **3.800** | **13.106** |
| 16 | **Ogn, Tórshavnar Havn** | | |
| | Materiell støðisogn | 346.994 | 326.184 |
| | Áogn | 14.749 | 11.560 |
| | Tøkur peningur | 70.544 | 69.467 |
| | | **432.287** | **407.211** |
| 17 | **Stuttfreistað skuld** | | |
| | Kassakredittir | 9.914 | 1.177 |
| | Ognarar og onnur skuld | 54.523 | 49.439 |
| | | **64.437** | **50.616** |
| 18 | **Skuld, Tórshavnar Havn** | | |
| | Langfreistað skuld | 15.648 | 18.861 |
| | Skuld til Tórshavnar kommunu | 0 | 0 |
| | | **15.648** | **18.861** |
| | Stuttfreistað skuld | 15.123 | 11.417 |
| | **Netto skuld** | **30.771** | **30.278** |

# NOTUR TIL FÍGGJARSTØÐUNA

| tkr. | 31/12 2008 | 31/12 2007 |
|---|---|---|
| **19 Trygdargrunnar v.m.** | | |
| Trygdargrunnar | 1.602 | 1.668 |
| | **1.602** | **1.668** |
| **20 Eginogn** | | |
| **Kapitalkonta** | | |
| Salda primo | 1.368.903 | 1.257.184 |
| Flutt frá rakstri | 50.185 | 111.719 |
| **Eginogn til samans** | **1.419.088** | **1.368.903** |